# Bilar

Nr. 112 • mikudagur • 14. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


**FAKTA**

**Mazda RX-8**

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 1,3 litur wankel 231 hk |
| **0-100 km/t** | 6,4 sek. |
| **Bensinnýtsla** | 8,8 km/l |
| **Dekkstødd** | 225/45-18 |
| **Stødd og vekt** | |
| **Longd** | 443,0 cm |
| **Breidd** | 177,0 cm |
| **Hædd** | 134,0 cm |
| **Eginvekt** | 1.250 kg |
| **Viðførisrúm** | 290 litrar |
| **Prísur** | kr. 448.000,- |
| **Søluumboð** | Bilasølan<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 315354<br>*www.bilasolan.fo* |

Mazda RX-8:

# 1,3 litur wankelmotor við 231 hk



*Mazda RX-8 er ein ektaður sportvognur við wankelmotori, fýra hurðum og sitiplássum til fýra persónar*

**Mazda RX-8 er ein einari á bilmarknaðinum sum tann einasti við wankelmotori. Talan er um ein ektaðan sportvogn við fýra hurðum og sitiplássum til fýra persónar**





*Designið er sermerkt og sera sportligt. Bakhurðarnar eru fjaldar, soleiðis at forhurðarnar fyrst mugu latast upp, áðrenn bakhurðarnar kunnu latast upp*


BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*


Tað ljóðar sum ein sjálvmótsøgn, at ein bilur við 1.3 litur motori hevur langt yvir yvir 200 hk, men soleiðis er við Mazda RX-8 við wankelmotori.

Í 1970- og 80-unum vóru lutfalsliga nógvir Mazda-bilar í Føroyum við wankelmotori, sum t.d. RX-2, RX-3, RX-4 o.s.fr. Eftir ein støðg í nøkur ár er so RX-8 komin á marknaðin.

Tá man setur seg við rattið á RX-8 og traðkar á spitaran, kennist tað, sum bilurin vil á flog – men sannleikin er, at talan er um ein bil við sera lágum tyngdipunkti og framúr góðum vegfesti undir øllum koyriumstøðum.

Ljóðið frá wankelmotorinum er nakað heilt serligt, tað er eins og eingin endi er á motorsnúningunum.

RX-8 er ein serligur bilur á so mangan hátt – ein ektaður sportvognur við fýra hurðum og sitiplássum til fýra persónar og einum motori, sum ikki kann sammetast við nakran annan.

Eisini designið er sermerkt, bilurin sær út, sum hann veruliga vil nakað. Bakhurðarnar eru fjaldar, soleiðis at forhurðarnar fyrst mugu latast upp, áðrenn bakhurðarnar kunnu latast upp. Eingin B-stólpi er, so tað er sera lætt at koma inn og út úr bilinum – eisini hjá teimum á baksetrunum.

Wankelmotorurin hevur eingi stempul og sylindarar, sum vanligir motorar hava, men tvey kømur við hvør sínum rotori inni í. Motorurin er eisini nógv minni og léttari enn ein vanligur motorur. RX-8 fæst við tveimum wankelmotorum við ávikavist 192 hk (5 gir), og 231 hk (6 gir). Bilurin verður drivin av bakhjólunum.

Kabinan er flott og sportlig í allar mátar, bæði hvat setrum og instrumentborðinum viðvíkur. Alt er gjørt úr gjøgnumførdum kvaliteti.

Viðførisrúmið upp á 290 litrar er ikki stórt, men er hóast alt stórt til ein sportbil í hesum klassanum.

Prísirnir á Mazda RX-8 byrja við kr. 377.000, meðan bilurin vit royndarkoyrdu kostar kr. 448.000,- við metallakki. RX-8 kann síggjast og royast hjá Bilasøluni í Hoyvík.


*Kabinan er flott og sportlig í allar mátar. Alt er gjørt úr gjøgnumførdum kvaliteti*